# StÍF spøkir aftur



*Seinnu árini hevur tað ligið væl fyri hjá StÍF at arga VÍF, og sunnudagin hava teir aftur møguleikan*

**VÍF hevur sunnudagin møguleikan at hevna tapið í steypakappingini, tá StÍF aftur kemur til Vestmanna**

HONDBÓLTUR – MENN
*Jákup Mørk*

Fagnaðurin var stórur á strandingum, tá teir mikukvøldið høvdu tryggjað sær finalusessin í Coca-Cola kappingini eftir samanlagdan sigur á VÍF.

Nú fýra dagar seinni koma strandingar aftur til Vestmanna, og so er spurningurin, um teir aftur fara at vinna vestmenningum neisur, soleiðis sum teir hava fingið til vana at gera.

### Strandingum dámar at arga

Tað er tó ein stórur munur á dystinum mikukvøldið og tí, sum nú verður leiktur. Nevnliga at lands- og steypakapping eru fullkomuliga hvør síni hugtøk.

Meðan vestmenningar uttan iva lnú eggja nógva alla orku í landskappingina, har teir stríðast fyri gullmerkjunum, so hevur StÍF í løtuni lítið meira enn bronsuna at verja. Hartil kemur, at strandingar kanska longu hava latið tankarnir ferðast fram til annað vikuskiftið, tá steypafinalan er á skránni, og tískil resta tey seinastu prosentini í til dystin sunnudagin.

Og so skal heldur ikki gloymast, at tað hóast alt var VÍF, sum vann dystin mikukvøldið. At tað ikki rakk til ein finalusess komst av, at teir taptu dystin á Skála.

Alt hetta bendir á tað borðið, at VÍF eigur at roknast sum favorittur til dystin, men sum sagt, so hava strandingar seinnu árini havt til fragd at arga vestmenningarnar.

Til stuttleikar kann nevnast, at verður inniverandi ár íroknað, so hevur VÍF bert tapt fimm landskappingardystir í trý ár, og ikki færri enn tríggir av hesum hava verið móti júst strandingum. Í sama tíðarbili hevur VÍF tríggjar tapt í steypakappingini, og tvær ferðir av hesum hava tað verið strandingarnir, sum hava bast teimum, so um nakar kann sigast at hava tak á VÍF, so mugu tað vera júst strandingar.

### Reisist H71?

Tveir aðrir dystir verða eisini leiktir um vikuskiftið.

Í oddinum skal Neistin »bara« syrgja fyri at vinna restina av dystunum, um møguleikin fyri at fanga VÍF aftur skal haldast á lívi, so treytirnar undan dystinum móti KÍF í Vestmanna eru greiðar.

Neistin má eisini metast sum stórfavorittur til dystin, tí eftir heldur strævnu byrjanina upp á kappingarárið hava teir vunnið trygt, so leingi sum VÍF ikki hevur verið mótstøðuliðið.

Seinasti dysturin verður í Runavík sunnudagin, har Tjaldur fær vitjan av H71, sum enn eigur fyrsta sigurin í endaspælinum til góðar. Skal H71 á nakran hátt blanda seg í heiðursmerkjastríðið, so er hetta helst seinasta útkall, men hinvegin kann Tjaldur við einum sigri lyfta seg upp á eitt fyribils søguliga høgt fjórða pláss, so alt í alt bendir tað á eina sera javna uppgerð í Runavík.

# Nú skal slagið standa

**Flogbóltur: Vinnur TB toppdystin móti Mjølni í morgin, er tað eitt risastórt fet fram móti FM-heitinum. Men vinnur Mjølnir, er støðan opnari enn hon nakrantíð hevur verið hetta kappingarárið. Hjá monnunum kann oddasessurin skifta eigara fyri áttandu ferð í kappingini**

*Emil Lisberg Jacobsen*

Í morgin klokkan 13.00 byrjar fyrsti partur av eini trilogi av dystum millum TB og Mjølnir - tríggir dystir sum allir hava nógv at siga.

TB og Mjølnir eru, sum nú er, jøvn í stigum. TB hevur í skrivandi løtu leikt ein dyst færri, men tað er broytt til sunnudagin, tí longu í gjárkvøldið høvdu TB-kvinnurnar vitjan av Fleyr. Um einki sera óvæntað er hent, vann TB tann dystin, men tað broytir ikki so nógv uppá fyritreytirnar hjá liðunum uppundir toppdystin í morgin. Serliga fyri Mjølnir er tað altumráðandi at vinna, um tær skulu halda fast í TB-liðnum, sum hevur ligið á odda í kappingini heilt frá fyrsta dysti.

Vinnur TB hinvegin í morgin, hava tær tikið eitt risastórt fet fram móti sínum fyrsta føroyameistaraheiti nakrantíð. So skal Mjølnir hava hjálp frá øðrum liðum, um tær skulu taka TB aftur, men í løtuni er ringt at síggja, hvaðani tann hjálpin skal koma.

So tað stendur sera nógv uppá spæl í morgin, tá TB og Mjølnir bresta saman í høllini í Trongisvági.

Tá vit siga, at hetta bara er tann fyrsti dysturin av trimum millum hesi bæði liðini, hugsa vit sjálvandi eisini um steypafinaluna 16. februar og um seinna landskappingardystin millum liðini í Klaksvík 2. mars. Meðan steypafinalan sjálvandi er eitt kapittul fyri seg, er tað ikki vist, at dysturin í Klaksvík fær nakran týdning - tað veldst um úrslitini í dystunum, sum koma áðrenn.

Ein dystur í kvinnudeildini varð sum sagt longu í gjárkvøldið, og var hann millum TB og Fleyr. Og ein triði kvinnudystur er eisini hetta vikuskiftið. Hann er á Kambsdali, har ÍF tekur ímóti Drátti. Dráttur er í løtuni í einum slag av ongamannalandi í kappingini. Tær hava mist sambandið við oddaliðini, men tær hava eisini luft niður til tey bæði botnliðini. Tapir Dráttur í morgin, minkar munurin til ÍF niður í eitt stig, men vinnur Dráttur, skuldu bronsumerkini verið tryggjað. Dysturin millum ÍF og Drátt skuldi eftir kappingarskipanini verðið leiktur í dag, men av tí at Mjølnirkapping fyri yngri deildir eisini er í dag, er dysturin fluttur til í morgin klokkan 13.00.

### SÍ kann taka oddasessin aftur

Er spenningurin stórur hjá kvinnunum, er hann ikki minni hjá monnunum, har trý lið togast um oddaplássini. Í løtuni er Fleyr fremst, men oddasessurin hjá teimum er kanska bara til láns, tí um SÍ vinnur móti ÍF á Kambsdali í morgin, fara sørvingar framvið Fleyr aftur. SÍ verður favorittur til at vinna móti ÍF í tí, sum kann metast sum ein forsmakkur til steypafinaluna millum hesi somu liðini, men vágamenn fara ikki at fáa nakað ókeypis frá fuglfirðingum, sum gjarna vilja halda Mjølnir aftanfyri seg, tað sum eftir er av kappingini.

Og so er tað Fram, sum enn er við í stríðnum um gullið, men skulu teir eisini vera tað aftaná hetta vikuskiftið, skulu teir helst hava vunnið móti Mjølni í Eysturskúlanum. Og tað skuldi ikki verið ómøguligt, tí Mjølnir tykist vera illa fyri í løtuni, og á heimavølli í Eysturbýnum eigur Fram at vinna. Men gongdin hjá Fram hevur ikki verið nakað at reypa av í seinastuni, og sigurin móti ÍF síðsta vikuskifti var teirra fyrsti í langa tíð. Tað er nú ella ongantíð hjá Fram, sum framvegis bert hevur tað eina føroyameistaraheitið frá 1997 at vísa á.

Kappingin í meistaradeildini hjá monnum er tann javnasta í nógv ár. Við eini kappingarskipan, sum inniber, at ikki øll liðini spæla hvørt vikuskifti, og har stigini vórðu koyrd í helvt á hálvari leið, hevur oddasessurin hjá monnunum skift eigara ikki færri enn sjey ferðir síðani kappingarbyrjan. Í fyrstani vóru tað SÍ og Fram, sum skiftust um hann, og síðsta sunnudag kom Fleyr so uppá fremsta plássið fyri fyrstu ferð í kappingini. Fleyr spælir ikki hetta vikuskiftið, og vinnur SÍ í morgin, verður tað sostatt áttandu ferð í kappingini, at oddasessurin skiftir hendur!



# Silvurið helst avgjørt

**Vinnur Stjørnan heimadystin móti Neistanum, eru tær mest sum vísar í silvurmerkjunum, meðan alt hinvegin er víðopið, um Neistin vinnur dystin**

HONDBÓLTUR – KVINNUR
*Jákup Mørk*



*Silvurið stendur upp á spæl, tá Neistin vitjar Stjørnuna í Klaksvík sunnudagin*

Tríggir dysstir í bestu kvinnudeildini verða á skránni um vikuskiftið, og meðan talan í tí eina førinum er um ein víðopnan dyst millum tveir av heiðursmerkjakanditatunum, eru favoritt-leilutirnir meira greiðir í hinum báðum.

### Silvurdystur í Klaksvík

Tað er eingin loyna, at undan hesum kappingarárinum høvdu klaksvíkingar vónir um at bjóða VÍF av í oddinum, og hóast hesar vónir neyvan eru sleptar enn, so tykist tað ógvuliga lítið sannlíkt, at Stjørnan skal vinna teir báðar dystirnar móti VÍF, sum helst eru treytirnar fyri einum FM.

Meira nærliggjandi er tá hjá klaksvíkngum at hugsa um at verja silvurplássið, sum tær í løtuni eru á, og hesum viðvíkjandi er dysturin sunnudagin av alstórum týdningi.

Neistin er í løtuni á triðja plássinum í landskappingini, tó at tað bert eru málini, sum halda tær framman fyri VB. Tvey stig eru upp til Stjørnuna, men við tað at Stjørnan hevur leikt ein dyst færri, er tað av avgerandi týdningi, at Neistin fær stig í Klaksvík, um silvurvónin framvegis skal vera ein møguleiki.

Hetta tykist tó vera ein torført uppgáva. Í grundspælinum vann Stjørnan báðar dystirnar móti Neistanum, og kreppan, sum liðið var í undan jólasteðgin tykist nú eisini vera hæsað av, so alt í alt má Stjørnan metast sum favorittur, tó at tað als ikki skal útilokast, at neistakvinnurnar kunnu gera ein vørr.

### Greiðari býti

Tá tosað verður um hinar báðar kvinnudystirnar, sum verða leiktir um vikuskiftið, so er einki at ivast í, at her eru favoritt-leiklutirnir væl greiðari.

Leygardagin ferðast VB til Giljanes, og hetta skal geva tvey stig, um VB skal hava møguleika fyri heiðursmerkjum. Tá Sóljan samstundis tykist vera í botni, eftir at tær farna vikuskifti taptu botnuppgerðina móti StÍF, átti alt at bent á ein útisigur.

Seinasti dysturin er í Vestmanna, har VÍF tekur ímóti StÍF. Hóast StÍF hevur havt fleiri góð úrslit seinastu tíðina, eins og VÍF í løtum hevur havt motivatiónstrupulleikar, so er tó lítið at ivast í, at styrkismunurin á liðunum er alt ov stórur, til at StÍF á nakran hátt eigur at kunna hótta oddaliðið.

# Tíðindaskriv



*Árliga jólakappingin í borðtennis hjá ÍSB varð leikt undanfarna vikuskifti*

BORÐTENNISKAPPING
*Tíðindaskriv*

Um vikuskiftið skipaði ÍSB og Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli fyri árligur jálakappingini í borðtennis.

Tíggju av stinnastu leikarunum í landinum vóru savnaðir í fimleikahøllini á Lærarasklúlanum, og menn kýttu seg.

Kappast var í tveimum bólkum. Jónsvein Petersen úr Haldórsvík vann kappingina fyri rørslutarnað. Jónsvein er ungur og gávaður leikari, men henda dagin fekk hann seg royndan. Atli Skaalum úr Tórshavn spældi væl henda dagin, og tað var um reppið, at hann vann á Jónsveini.

Kappingin fyri menningartarnað var ikki eins spennandi. Jógvan Jákup Høj úr Tórshavn er einaráðandi, og hann vann væl og virðiliga.

ÍSB hevur havt borðtennis á skránn í sløk tvey ár. Menn og kvinnur eru dúglig at venja. Í september setti ÍSB kenda borðtennisleikaran Petur Niclasen í starv sum landsliðsvenjara, og Petur hevur longu nú fingið nógv á skaftið.

### Úrslitið av kappingini

Rørslutarnað

1. Jónsvein Petersen, Haldórsvík
2. Atli Skaalum, Tórshavn
3. Haldur Hansen, Runavík

Menningartarnað

4. Jógvan Jákup Høj, Tórshavn
5. Júst í Túni, Toftir
6. Jørgen av Vollanum, Miðvágur
7. Unn Mortensen, Tórshavn
8. Tórur H. Jacobsen, Vágur
9. Elvin Weihe, Runavík
10. Theodor Esmar Hansen Kollafjørður

## Máltindarnir

**Kvinnur:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Asta Petrauskine | Sóljan | 126 | (18) |
| Simona Dziugyte | Stjørnan | 125 | (36) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 107 | (47) |
| Gabriella Fekete | VB | 101 | (25) |
| Ioana Rápa | VÍF | 97 | (23) |
| Regina Radó | VB | 80 | (20) |
| Joan M. Joensen | Stjørnan | 77 | (2) |
| Ileana Manulescu | StÍF | 76 | (12) |
| Annika Ljósstein | Kyndil | 75 | (13) |
| Katrin á Neystabø | Neistin | 72 | (34) |
| Sóley Mikkelsen | VÍF | 64 | (12) |
| Anna K. Samson | Stjørnan | 60 | (1) |
| Andrijana Milodanovic | Stjørnan | 60 | (6) |
| Birita Wardum | Neistin | 59 | (10) |
| Nicoleta Radu | VÍF | 58 | (1) |

**Menn:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Jacob Jónsson | Neistin | 103 | (15) |
| Bjarni Wardum | H71 | 102 | (22) |
| Costin Dumitrescu | StÍF | 95 | (28) |
| Høgni Klein | Kyndil | 93 | (7) |
| Heini Joensen | Neistin | 92 | (25) |
| Ingi Olsen | VÍF | 84 | (10) |
| Finnur Hansson | H71 | 83 | (20) |
| Dragisa Stojovic | Tjaldur | 82 | |
| Halgir Dahl Olesen | H71 | 82 | (10) |
| Durica Tomic | KÍF | 81 | (21) |
| Sámal Joensen | VÍF | 80 | (13) |
| Iljan Topic | KÍF | 76 | |
| Áki Olsen | VÍF | 71 | (10) |
| Artur Johansen | StÍF | 67 | (5) |
| John Petersen | Neistin | 66 | (1) |

## Dystir hetta vikuskiftið

### Hondbóltur

1. deild kvinnur

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 26.01 | 15.00 | Sóljan | - | VB |
| 27.01 | 15.00 | Stjørnan | - | Neistin |
| 27.01 | 14.30 | VÍF | - | StÍF |

1. deild menn

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 26.01 | 17.50 | KÍF | - | Neistin |
| 27.01 | 16.00 | Tjaldur | - | H 71 |
| 27.01 | 16.00 | VÍF | - | StÍF |

### Flogbóltur

Meistaradeild kvinnur

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 25.01 | 21.00 | TB | - | Fleyr |
| 27.01 | 13.00 | ÍF | - | Dráttur |
| 27.01 | 13.00 | TB | - | Mjølnir |

Meistaradeild menn

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 27.01 | 15.00 | ÍF | - | SÍ |
| 27.01 | 15.00 | Fram | - | Mjølnir |

## Hondbóltsstøður

### 1. Deild kvinnur

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 2 | 2 - 0 - 0 | 411 | 251 | 160 | 16 |
| 2 | Stjørnan | 2 | 2 - 0 - 0 | 380 | 293 | 87 | 13 |
| 3 | Neistin | 3 | 1 - 1 - 1 | 324 | 291 | 33 | 11 |
| 4 | VB | 3 | 2 - 1 - 0 | 354 | 362 | -8 | 11 |
| 5 | Kyndil | 3 | 0 - 0 - 3 | 338 | 396 | -58 | 3 |
| 6 | StÍF | 2 | 1 - 0 - 1 | 255 | 319 | -64 | 3 |
| 7 | Sóljan | 3 | 0 - 0 - 3 | 267 | 417 | -150 | 2 |

### 1. Deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 3 | 3 - 0 - 0 | 438 | 366 | 72 | 17 |
| 2 | Neistin | 3 | 2 - 0 - 1 | 469 | 393 | 76 | 14 |
| 3 | StÍF | 2 | 2 - 0 - 0 | 395 | 370 | 25 | 10 |
| 4 | H71 | 3 | 0 - 1 - 2 | 406 | 431 | -25 | 7 |
| 5 | Tjaldur | 3 | 1 - 0 - 2 | 366 | 416 | -50 | 6 |
| 6 | Kyndil | 3 | 1 - 1 - 1 | 342 | 395 | -53 | 5 |
| 7 | KÍF | 3 | 0 - 0 - 3 | 393 | 438 | -45 | 4 |

## Flogbóltsstøður

### Meistaradeild, kvinnur

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | TB | 10 | 9 - 1 | 28 | 7 | 21 | 11 |
| 2 | Mjølnir | 11 | 8 - 3 | 27 | 15 | 12 | 11 |
| 3 | Dráttur | 11 | 5 - 6 | 21 | 22 | -1 | 6 |
| 4 | ÍF | 11 | 3 - 8 | 17 | 27 | -10 | 3 |
| 5 | Fleyr | 11 | 2 - 9 | 8 | 30 | -22 | 3 |

### Meistaradeild, menn

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Fleyr | 12 | 8 - 4 | 29 | 21 | 8 | 11 |
| 2 | SÍ | 11 | 8 - 3 | 28 | 14 | 14 | 10 |
| 3 | Fram | 11 | 7 - 4 | 26 | 20 | 6 | 8 |
| 4 | ÍF | 11 | 2 - 9 | 13 | 30 | -17 | 4 |
| 5 | Mjølnir | 11 | 3 - 8 | 16 | 27 | -11 | 3 |